


*Nr. 7* *2. apríl 2017* *77. árg.*

# At leggja lív sítt á fyri onnur

*„Harri, hví kann eg ikki fylgja tær nú? Eg vil leggja lív mítt á fyri teg." Jesus svarar: „Vilt tú leggja lív títt á fyri meg? Sanniliga, sanniliga sigi eg tær: Hanin skal ikki gala, fyrr enn tú hevur avnoktað meg tríggjar ferðir." Jóh.13,37–38.*

Tað er als ongin ivi um, at Pætur meinti tað í álvara, sum hann segði. Eftir at Jesus og lærusveinarnir høvdu verið saman hetta seinasta kvøldið, kendu helst bæði Pætur og hinir, at teir nú vóru nærri knýttir at Jesusi enn nakrantíð. Tá ið hann tí segði, at hagar hann nú fór, kundu teir ikki fylgja honum, gjørdust teir bæði óttafullir og stúrnir. Teir vildu ikki fyri alt í verðini skiljast frá Jesusi. Pætur er tann, sum tekur ramligast til: „Eg vil leggja lív mítt á fyri teg."

Av og á uppliva vit, at eitt menniskja hevur so nógv at týða fyri okkum, at vit eru sinnað at gera alt fyri viðkomandi. Men tað kann lættliga bara gerast ein alda av kenslum, sum so aftur leggur seg. Nógv okkara hava upplivað, hvussu vit kunna svíkja tey, sum vit annars halda allarmest av. Í Pætursa føri lá størsti sorgarleikurin og lúrdi beint hinumegin hornið.

Jesus fekk rætt. Hanin náddi ikki at gala og harvið boða frá, at morgunin var á veg, fyrr enn Pætur tríggjar ferðir hevði avnoktað Jesus og enntá bannað uppá, at hann kendi hann ikki. Tað man vera torført at sleppa djúpari niður í vanvirðing fyri sær sjálvum, enn í ta støðuna, sum Pætur má hava kent seg í tann morgunin. Hann hevði svikið sín besta vin, tá ið hann

varð førdur burtur at doyggja. Lætt er at skilja, at Pætur fór útum og græt sáran hesa óhugnaligu, svørtu náttina.

Jesus fekk eisini rætt á ein annan hátt. Vegin, sum hann mátti ganga, mátti hann ganga einsamallur. Hann gekk hann nevniliga í okkara stað, so at vit kunna sleppa undan at ganga hann. Tí kundu lærusveinarnir ikki fylgja honum. Og vit hvørki kunnu ella skulu gera honum tað eftir. Bara Jesus kann geva lív sítt sum frelsugjald fyri okkum.

***Hann á krossinum aleina***
***øll mín vón og gleði er;***
***hvat so aðrir vilja meina,***
***hann hjá mær av øllum ber.***
***Ongin tann, ið nevnast kann,***
***gjørdi mær so stórt sum hann:***
***Hann kann meg við Gud sameina,***
***hann á krossinum aleina.***

# Takksemi er sannur heilivágur

*Elin Kanestrøm, Troens Fellesskap, Molde.*

Bíblian mælir okkum til at vera takksom. Hví? Eg trúgvi, at Bíblian er innblást av okkara Skapara, og at hon á mangan hátt er ein brúkaravegleiðing, so at vit menniskju kunnu liva tað skilabesta lívið, sum ger okkum nøgd heilt inn í sálardýpið, og sum er til signingar fyri onnur.

Tak t.d. hetta við gleði. Í Orðtøkum Sálomons, sum eru skrivað uml. 950 ár f. Kr., stendur, at gleði í hjartanum gevur góða heilsu. Í dag eru granskingar og ritgerðir, sum vísa hvønn lekjandi og heilsuberandi vinning látur og gleði hava upp á kroppin. Eg hoyrdi fyri stuttum, at immunverjan er styrkt í 45 minuttir, eftir at vit hava havt ein góðan látur.

Og so er tað hetta við takksemi. Í Fyrra Tessalónikubrævi sigur Paulus: „Takkið í øllum førum! Tí at hetta er vilji Guds í Kristi Jesusi til tykkara.“ Hann sigur ikki, at vit skulu takka fyri øll viðurskifti, men undir øllum viðurskiftum. Har er týðiligur

munur. Bíblian sigur greitt, at Gud gevur okkum bara GÓÐAR gávur. Hann er kærleiki. Tað ónda kemur frá djevlinum, og tað takka vit ikki fyri.

Okkara hugburður skal vera takksemi. Hví? Er tað, av tí at Gudi tørvar tað og vil hava tað fyri SÍN egna part? Nei, eg haldi, at tað er, av tí at okkum tørvar tað. Takksemi er eitt slag av heilivági til okkara, sum hjálpir móti fleiri viðurskiftum. Her eru nøkur:

Fyrst av øllum hjálpir tað móti sjálvgóðsku. Takksemi ger, at vit fáa eyguni burtur frá okkum sjálvum og ásanna, hvat ið Gud og onnur menniskju hava at týða fyri okkum. Tað ger, at vit fáa hug at geva okkurt aftur, og tískil ríka vit eisini okkara sambond. Takksemi hjálpir okkum móti óynsktari keypstrongd! Hetta er sagt í kæti, men tað er veruliga satt. Hetta eru eini góð ráð til teirra, ið taka lut í luksusfelluni. Tá ið eg fái hug at keypa okkurt, sum eg sanniliga ikki átti at brúkt pengar uppá – fyri mín part eru tað ting inni í húsinum – so byrji eg at takka fyri alt tað, sum eg longu havi. Tá er nógv lættari at fara út úr handlinum við tómum hondum og fullum pungi.

Takksemi hjálpir eisini móti strongd og innara ófriði. Mong strevast við at lata frið falla á tankarnar, tí ferðin á øllum er so ræðulig í dag, og tað tærir upp á sálarligu heilsuna og tað likamligu við. Tá ið tú leggur dent á at hugsa um ting, tú ert takksamur fyri, so hevur títt uppmerksemi úr at gera, og vøddarnir linka, kroppurin slappar av, og strongdin minkar. Ein framúr sissandi heilivágur, uttan hjáárin! Harumframt er hann heilt ókeypis.

Ert tú sannførdur? Vit áttu avgjørt at gjørt tað til ein lívsstíl at verið takksom!

Hetta stykkið stóð í Romsdals Budstikke 9/6-2012.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað er torført at síggja ljósið, tá ið tú stendur í tí skeiva endanum í einum longum og myrkum tunli. Men ljósið er har. Og hann, sum er sjálvt ljósið, sigur við teg: „Óttast ikki, eg endurloysi teg; eg nevni teg við navni, tú ert mín!“ Jes. 43,1.

*e.c.* ums.

# Tann krossfesti Kristus

Jesus er tann krossfesti Kristus. Langa fríggjadag kunnu vit onkuntíð í sjónvarpi síggja menniskju, sum pína seg sjálvi og halda at tey tóknast Gudi við at gera hetta. Summi dragsa ein kross, sum tey eru bundin at; Summi vóru enntá negld føst í krossin. Tey hildu, at tey á tann hátt kundu hava uppiborið Guds vælvild og á tann hátt sleppa til himmals.

Nei, á krossinum gjørdi Jesus alt sjálvur. Hann boygdi høvdið og segði: „Tað er fullgjørt!“ (Jóh. 19, 30). Vit kunnu gera góðar gerðir, vit kunnu lata okkum negla á túsundtals krossar, men tað leiðir okkum ikki til himmals. Tað, sum leiðir okkum til himmals, er tað, sum Jesus gjørdi fyri okkum á krossinum á Golgata, tá ið hann læt blóð sítt fyri okkum.

Hví doyði Jesus? Ikki tí at hann hevði syndað? Hann doyði í okkara stað. Bíblian sigur: „Tann, sum ikki visti um synd, gjørdi hann til synd okkara vegna, fyri at vit skulu verða Guds rættvísi í honum.“ (2. Kor. 5,21). Hugsa um hetta. Hann varð gjørdur til synd. Hann varð gjørdur sekur í hori, í morði, í lygn, í øvund. Hann tók alla synd okkara á seg. Av tí at Jesus gjørdi tað, sigur Gud: „Eg kann fyrigeva tær.“

---

Tað kemur eitt ættarlið, sum ikki skal doyggja, men sum verður rykt burtur, tá ið Jesus kemur í skýggjunum.

e.c. ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 2. apríl | Tekstur: Matt. 18,21-35; | bíbliuorð: Matt. 6,12 |
| 9. apríl | Tekstur: Luk. 19,28-40 og Mark. 15,16-37; | bíbliuorð: Jóh. 3,16 |
| 16. apríl | Tekstur: Mark. 16,1-15; | bíbliuorð: Mark. 16,15b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 8* *16. apríl 2017* *77. árg.*

# Boðskapurin til Pæturs

*„Men farið avstað, sigið við lærusveinar hansara og við Pætur: Hann fer undan tykkum til Galilea; har skulu tit síggja hann, soleiðis sum hann hevur sagt tykkum!“ Mark. 16,7.*

Ongan kom boðskapurin um Jesu uppreisn so óvart á sum á Pætur. Hann, sum hevði sagt, at hann var fúsur at doyggja fyri Jesus, og sum síðani sveik so dyggiliga. Hann hevði møtt Jesu eygum hesa longu, ráðaleysu løtuna, tá ið hermenninir fóru yvir í garðin hjá høvuðsprestinum við Jesusi. Pætur fekk ikki høvi at siga nakað við hann ella at biðja hann um fyrigeving. Tá ið hann sá hann andast á krossinum, var ov seint. Hann má hava grivið seg niður í sínum egna vónloysi og iðran.

Tað hevði ikki verið løgið, um Jesus hevði sagt, at nú hevði hann fingið nóg mikið av honum. Men her fortelur Markus okkum, at Jesus eftir uppreisnina hugsaði serliga um Pætur. Eingilin hevði fingið boð um at bera Pæturi eina serliga heilsan. Pætur var tann, sum tørvaði hana mest, og hann mátti hava torførast við at trúgva, at Jesus vildi hava nakað við seg at gera eftir tað, sum hent var.

Boðskapurin til Pæturs og hinar var, at Jesus vildi hitta teir aftur. Og hann vildi hitta teir har, sum hann fyrstu ferð var saman við teim flestu teirra, nevniliga í Galilea. Har teir vórðu kallaðir til at fylgja honum. Nú vildi hann endurnýggja kallið júst har. Hann hevði ikki uppgivið teir, hóast teir høvdu svikið.

Jesus hevur sum tann upprisni eina heilsan til øll, sum hava svikið. Hann bjóðar inn til eina nýggja byrjan saman við sær.

Soleiðis møtir hann eisini okkum í dag. Tørvar tær eina slíka heilsan frá Jesusi, so er hon til tín.

„Far til mínar brøður,
gleðiboð teim ber:
leið mín ber til himmals,
har mín faðir er;
mín og tykkar' faðir
mín og tykkar' Gud!"
Henda sæla heilsan
bar teim lív í lut.

„Serliga til Pæturs,
sum ei kendi meg,
ber tú hesa heilsan:
„Jesus elskar teg!"
Sig so, at eg livi,
skunda tær avstað,
alt er fyrigivið,
boða honum tað!"

# At vitna

Tá ið deyðin kemur til okkara, hvat hevur tá størri týdning enn tað, sum vit hava gjørt fyri Jesus og tikið fólk við okkum á himmalvegin? Tað má vera, at vit vita, at vit ið hvussu er, hava roynt at vera ljós og salt í verðini, meðan vit livdu. Tí mugu vit biðja um náði at fullføra skeiðið, verða varðveitt í trúnni og vinna menniskju fyri Jesus og vitna um Hann fyri teimum, vit hitta á okkara leið. Vit vitna og geva fólki ein møguleika at verða frelst; men tað er ikki altíð, at fólk taka av.

Í tí sambandi kom eg at hugsa um ungdómsvin mín, Harald. Hann doyði bara 64 ára gamal. Hann drakk seg í hel, livurin var oyðiløgd. Eg vitnaði fyri honum, uttan at hann tók ímóti Jesusi.

Hin óndi vil ikki, at vit skulu vitna, og hann brúkar øll listarbrøgd, um hann sær, at tað fer at eydnast. Tá ið eg, konan og børnini skuldu fara ein túr niðan í smáttuna, fekk eg ógvisliga pínu í lærlegshálsin og oman í beinið. Eg segði tí: „Tit, eg haldi, at eg noyðist at verða heima, tí eg havi so ilt í beininum." Men so steðgaði eg á og fór at tala við beinið: „Í Jesu Kristi navni, pína, fær nú! Við sárum hansara havi eg fingið lekidóm, og eg bindi hesa pínuna í Jesu navni."

Jesus hevur undirvíst okkum og sagt, at vit skulu tala við „fjallið", sum er ein mynd upp á okkara trupulleikar, og biðja tað flyta seg (Matt. 17,20; Matt. 21,21; Luk. 17,6) Eisini hevur Jesus undirvíst okkum í at binda og loysa: „Sanniliga sigi eg tykkum: Tað, sum tit binda á jørð, skal vera bundið í himli; og tað, sum tit loysa á jørð, skal vera loyst í himli." (Matt. 18,18; Matt. 16,19).

So fór eg til gongu, og tá ið eg hevði gingið 300 m var eg frískur. Tá ið vit komu runt um tangan og oman í fjøruna, stóðu tveir menn har og fiskaðu sjósíl. Eg fór at práta við annan, sum segði, at lívið hjá sær var broytt, tá ið sonur hansara doyði 19 ára gamal í einari bilvanlukku. Hann segði, at hetta materiella hevði ongan týdning fyri sær longur. „Nú leiti eg altíð út í náttúruna."

Tá fekk eg vitnað fyri honum um Jesus, men uttan at eg fekk biðið við honum til frelsu. Eg segði kortini við hann: „Tá ið tú stendur her við tráðuni, sig so hart: „Jesus, ert tú her, opinbera teg so fyri mær." Eg fór glaður frá honum, tí eg hevði fingið sagt okkurt um Jesus, og eg bað Gud frelsa hann.

Tá skilti eg, hví djevulin hevði kastað pínu á meg, bara fyri at eg ikki skuldi vitna um Jesus.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hann er upprisin

*Hann er ikki her, tí at hann er risin upp. Matt.28,6.*

Kristus er upprisin! Soleiðis heilsaðu hini fyrstu kristnu hvør øðrum. Tey vildu fegin hittast við so hátíðarligari og bjartari heilsan sum gjørligt. Tí var onki betri enn hesi orðini, sum eru søgunnar største undur: *Kristus er risin upp!*

Jesu uppreisn er Guds undirskrift á rokningina, sum Kristus rindaði langafríggjadag. Hon er rindað – ongin skuld er! Ein signaður boðskapur!

Og Jesu uppreisn peikar á okkara uppreisn: „Men nú er Kristus risin upp frá deyðum sum frumgróðurin av teimum, sum sovnað eru burtur." (1. Kor.15,20). Vónarljós verða kveikt yvir okkara gravum í hinum kvirra deyðans urtagarði. Ein afrikanari, sum fyrstu ferð hoyrdi um hetta, segði: „Nei, nei – ongin uppreisn má vera, eg vil ikki hitta allar teir fíggindarnar, sum eg havi tikið lívið av!" Á, nei, tað verður kanska onkur, vit skammast við at hitta aftur; men so eru tað eisini onnur, ið vit gleða okkum til at hitta.

Men allarmest gleðir tú teg at standa andlit til andlits við Jesusi. Jú, víst, tey, sum trúgva á hann, koma ikki til dóms, men hava stigið yvirum frá deyðanum til lívið.

*t.*týddi.

# Tann krossfesti Kristus

Jesus er tann krossfesti Kristus. Langa fríggjadag kunnu vit onkuntíð í sjónvarpi síggja menniskju, sum pína seg sjálvi og halda at tey tóknast Gudi við at gera hetta. Summi dragsa ein kross, sum tey eru bundin at; Summi vóru enntá negld føst í krossin. Tey hildu, at tey á tann hátt kundu hava uppiborið Guds vælvild og á tann hátt sleppa til himmals.

Nei, á krossinum gjørdi Jesus alt sjálvur. Hann boygdi høvdið og segði: „Tað er fullgjørt!“ (Jóh. 19, 30). Vit kunnu gera góðar gerðir, vit kunnu lata okkum negla á túsundtals krossar, men tað leiðir okkum ikki til himmals. Tað, sum leiðir okkum til himmals, er tað, sum Jesus gjørdi fyri okkum á krossinum á Golgata, tá ið hann læt blóð sítt fyri okkum.

Hví doyði Jesus? Ikki tí at hann hevði syndað? Hann doyði í okkara stað. Bíblian sigur: „Tann, sum ikki visti um synd, gjørdi hann til synd okkara vegna, fyri at vit skulu verða Guds rættvísi í honum.“ (2. Kor. 5,21). Hugsa um hetta. Hann varð gjørdur til synd. Hann varð gjørdur sekur í hori, í morði, í lygn, í øvund. Hann tók alla synd okkara á seg. Av tí at Jesus gjørdi tað, sigur Gud: „Eg kann fyrigeva tær.“



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir!***

***Blaðstjórin.***



**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 16. apríl | Tekstur: Mark. 16,1-15; | bíbliuorð: Mark. 16,15b |
| 23. apríl | Tekstur: Jónas 1-4; | bíbliuorð: Jónas 2,10b |
| 30. apríl | Tekstur: 1. Kong. 17,1-16; | bíbliuorð: Luk. 1,37 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74